**Reglugerð fyri vali av starvsfólki og lesandi í stýrið fyri Fróðskaparsetur Føroya**

Vísandi til grein 9 í seturslógini frá 9. juni 2008 og til reglur ásettar av Mentamálaráðnum 18. juli 2008 verður boðað frá, at mannagongdin fyri vali av starvsfólki og lesandi sum umboð í stýrið verður henda:

1. Starvsfólk verða vald fyri 3 ár í senn og lesandi fyri 1 ár. Triðja hvørt ár verður skipað fyri vali av starvsfólki og einaferð um árið fyri lesandi.
2. Øll fólk í føstum starvi á setrinum hava rætt til at velja 2 umboð í stýrið og 2 varastýrislimir. Øll lesandi á setrinum hava rætt til at velja 1 umboð í stýrið og 1 varastýrislim.
3. Øll, sum eru í føstum starvi uttan tíðaravmarking tann fyrsta í mánaðinum, sum valið fer fram, og sum eru sett minst hálva tíð, hava valrætt og eru valbær. Ph.D.-lesandi hoyra til studentabólkin.
4. Øll lesandi, sum eru innskrivað við setrið tann fyrsta í mánaðinum, sum valið fer fram, hava valrætt og eru valbær.
5. Rektarin ásetir valdagin.
6. Deildirnar á Fróðskaparsetri Føroya gera yvirlit yvir tey fólk, sum hava valrætt. Setursskrivstovan ger tveir felagslistar yvir fólk, sum hava valrætt, ávikavist ein fyri lesandi og ein fyri starvsfólk.
7. Tey, ið ynskja at stilla upp til val, lata rektaranum váttan í seinasta lagi 4 vikur áðrenn valdagin. Tá freistin er farin, ger Setursskrivstovan tveir vallistar, ein fyri lesandi og ein fyri starvsfólk, sum verður latin rektaranum.
8. So skjótt rektarin hevur góðkent vallistarnar, verða teir kunngjørdir á heimasíðum setursins og á sjónligum staði á deildum setursins, starvsfólk á lista fyri seg og lesandi á lista fyri seg.
9. Starvsfólkini hava loyvi til at seta kross við upp til tveir persónar á listanum.
10. Lesandi hava bert loyvi til at seta kross við ein persón á listanum.
11. Rektarin setir valnevnd at skipa fyri valinum og at telja upp atkvøðurnar.
12. Tey fyrst valdu á starvsfólkalistanum verða stýrislimir, og triðji- og fjórðvaldi verða varalimir.
13. Tann fyrst valdi á lista teirra lesandi verður stýrislimur og næstvaldi varastýrislimur.
14. Valúrslitið verður kunngjørt seinast 3 yrkadagar eftir, at valið er avgreitt.
15. Kæra um hildið val skal skrivliga, innan 3 yrkadagar eftir at úrslitið er kunngjørt, av hvørjum valførum persóni verða latin rektara, sum saman við valnevndini tekur støðu til kæruna innan 1 viku. Avgerð teirra er endalig.

7. mai 2009
Stýrið fyri Fróðskaparsetur Føroya